Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Góðir ambassadørar fyri Føroyar

## *Oddagrein*

NÚ umleið 10 ár eftir, at Føroyar komu á altjóða fótbóltslandakortið við søguliga sigrinum móti Eysturríki, gjørdi føroyska fótbóltslandsliðið aftur av álvara vart við seg sunnudagin. Landsliðið legði út í fyrsta dystinum í kvalifiseringini til komandi heimsmeistarakapping við einum javnleiki móti Slovenia.

VIT vilja saman við øllum føroyingum ynskja landsliðnum tillukku við hesum frálíka úrsliti. Tað var einki minni enn eitt bragd, tá tað eydnaðist okkara monnum at skora tvær ferðir seinastu tveir minuttirnar av dystinum. Lagnunar speisemi kann tað eisini sigast at vera, at Slovenia, sum í EM-kappingini megnaði at vera á odda við trimum málum móti Jugoslavia nærum allan dystin, tá Jugoslavia móti endanum av dystinum kortini megnaði at fáa trý mál. Júst sama gongdin sum í hesum fyrsta HM-kvalifiseringsdystinum móti Føroyum. Spell fyri Slovenia, men gott fyri Føroyar, sum við hesi góðu byrjan hevur lagt upp til eina spennandi framtíð fyri Føroya í altjóða fótbólti.

TAÐ eru helst mong, sum ikki hava stórvegis áhuga fyri fótbólti, tá tað um heimligu kappingina viðvíkur, men tá tað ræður um tjóðina - um at vinna Føroyum virðing og heiður úti í heimi, eru helst allir føroyingar áhugaðir og sera fegnir, tá tað gongur okkara landsliði væl. Landsliðið í fótbólti er nakað fyri seg. Tað er líkasum okkara flaggberi úti í heimi, tað er okkara skjaldramerki. Ein týðandi partur av okkara samleika, identiteti.

LANDSLIÐIÐ hevur verið við til at marknaðarføra Føroyar og føroyskar fótbóltsspælarar. Tað hevur givið úrslit, tí í dag eiga vit fleiri professionellar fótbóltsspælarar úti í heimi, og einki er at ivast í, at fræg úrslit sum tað móti Slovenia, eru við til at seta ljóskastaran á føroyskar spælarar í altjóða fótbóltshøpi. Og henda positiva gongd er so við til at menna føroysku spælararnar, nakað, sum so aftur gagnar landsliðnum, tí tað harvið fær betri spælarar.

NÚ 10 ár eru farin, síðani vit av álvara komu okkum uppí altjóða fótbólt síggjast úrslitini, ikki bert á leikvølli, men eisini í gerandisdegnum. Føroyar eru vornar meira kendar kring heimin gjøgnum okkara fótbóltslandslið. Hetta hevur uttan iva stóran psykologiskan týdning, tá umræður at marknaðarføra Føroyar og føroyska vørur. Ja landsliðið hevur við sínum úrslitum verið við til at menna útflutning og skapa áhuga fyri okkara lítlu tjóð. Her mugu vit ikki gloyma ferðavinnuna, sum eisini er eitt av beinunum, ið okkara búskapur skal standa á. Útlendingar í vaksandi tali velja at vitja hetta lítla forkunnuga landið úti í Atlantshavi, eftir at teir hava hoyrt um tað gjøgnum fótbóltslandsliðið.

SEINASTA vikuskiftið var eisini í aðrar mátar merkt av góðum ítróttarúrslitum. Lat okkum beinanvegin ynskja Føroya sterkasta manni, og nú vinnara av stóru kappingini Atlantic Giant, Regini Vágadal tillukku við góða úrslitinum. Eftir at hava stríðst og strevast í fleiri ár hevur tað eydnast hesi føroysku kempuni at røkka einum av týðandi tindunum og vinna heitið Atlantsrisin. Úrslit hansara sigur okkum so mikið, at treiskni, venjing og trúgvin uppá at røkka á mál hevur borið ávøkstur. Sanniliga má sigast, at hetta hevur verið eitt gott og hendingarríkt vikuskifti fyri føroyskan ítrótt og fyri Føroyar sum so. Regin og fótbóltslandsliðið eru kanska okkara bestu ambassadørar. Tillukku enn einaferð og góðan byrð.

***Sosialurin***

## Viðmerkingar:

# Suðuroy og økismenning

Suðuroy er ein av teimun útoyggjum, sum tørva nýggj arbeiðspláss, fyri at fólk kunnu trívast og harvið blíva verandi á staðnum.

Eg havi fyrr skrivað, at mær vitandi hava allir løgtings- og landsstýrismenn sagt, at útjaðarin skal mennast, men tá tað kemur til veruleikan, so eru politikarnir sum oftast orðloysingar, tí har hendur einki, uttan at nevndir og aðrir bólkar verða sett saman, og so sovnar alt burtur.

Tað skal ikki so nógv hugflog til frá almennari síðu fyri at útvega nøkur arbeiðspláss í Suðuroy, og kann eg vísa á tvey dømi:

1.Stór yvirskrift í Sosialinum:
Næmingar í Havn hava ongastaðni at búgva.

Fyri at loysa henda stóra trupulleika, kundu myndugleikarnir, samstundis sum studentaskúlin í Suðuroy verður útbygdur, eisini fingið bygt skúlaheim til næmingar úr øllum Føroyum í Suðuroy.

Henda loysnin hevði eisini havt tað við sær, at næmingar ikki høvdu verið noyddir at farið til Danmarkar fyri at fáa sær hesa útbúgving vegna íbúðartrot. At hendan loysnin er tann bíligsta fyri teir almennu mynduleikarnar, kann tað ikki verða nakar ivi um, og at fingið byggiøki í Suðuroy til hesa loysn hevði neyvan verði nakar trupulleiki.

Somuleiðis fer tann nýggi SMYRIL at gera ferðingina væl styttri og betri millum Suðuroy og hin partin av Føroyum

Økt næmingatal á studentaskúlanum í Suðuroy hevði natúrliga gjørt útboðið til ungfólk í Suðuroy størri, tað er eingin ivi um tað.

2. ONS 2000 framsýning í Stavanger fyri feløg innan oljuídnaðin.

Á rundferð til útgerðarhavnir í Stavangerumráðnum kom tað týðiliga fram, at tað vóru ov nógvar útgerðarhavnir, og at hetta hevði við sær, at eingin útgerðarhavn var brúkt fult út, sjálvt í hesum risastóra oljubýi.

Ein oljuútgerðarhavn á Drelnesi, sum núverandi politiski myndugleiki hevur tikið undir við, hevði givið Suðuroynni eina natúrliga økismenning, tí hetta virksemi hevði ment seg, soleiðis at allir partar í samfelagnum kundu fylgt við menningini.

Teir kommunalu og landspolitsiku mynduleikar og vinnan í Føroyum høvdu havt lætt við at fylgt við menningini, tí økið er avmarkað til eitt pláss, Drelnes, har lítið og einki virksemi er í dag.

Hesi bæði tiltøkini høvdu givið Suðuroy ein íblástur, sum er hart tiltrongdur, somuleiðis høvdu hesi bæði tiltøk givið ein áhuga ímillum hesar báðar partar, ungdóm og vinnu, sum uttan iva kom at verða øllum Føroyum til gagns í framtíðini.

**Finnleif Guttesen**
**Tvøroyri**

# Fólk og mýs

**Ikki kunnu vit siga annað enn at varaløgmaður higartil hevur havt eydnuna við sær, tá talan er um at skaða viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.**

Í Útvarpi Føroya segði varaløgmaður millum annað, at tað er ikki rætt at samráðingar fara fram á ein slíkan sjónleikarahátt. Høgni Hoydal metir sostatt at samráðingarnar við danir bert eru ein reinur sjónleikur.

Hetta er ein syrgilig staðfesting og eisini ein álvarsom ákara. Men at fara heilt til ST og har skrivliga skuldseta danir fyri beinleiðis ikki at vilja samráðast, er tann grovasta og eisini tann mest skaðiliga ákæran sum nakrantíð er komin frá Føroya Landsstýri.

**Hvar er tað sømuliga markið?**
Omaná tær mongu ákærurnar, sum settar eru, vil varaløgmaður nú mæla til, at vit samráðast sum fólk heldur enn at lata okkur trýsta eins og mýs, sum verða fóraðar í búri.

Vit eru mong sum stórliga undrast, og spyrja um varaløgmaður ikki kennir nakað sømiligt mark?

Sjálvandi ber væl til at samráðast bæði fólkaliga og sakliga við danir, og haraftural er tað eisini líka eyðsýnt, at vit fáa júst tað úrslit, sum fólkið ynskir. Varaløgmaður hevur tí als onga orsøk til at kenna seg sum eina rædda og kroysta mús.

**Loysing ella sjálvstýri**
Um vit brúka teir møguleikar, sum verandi skipan gevur, kunnu vit frítt velja millum loysing ella fult sjálvstýri í einum nýggjum felagsríki. Her finst als eingin forðan, og tískil er óneyðugt hjá varaløgmanni at leggja so stóra orku í at oyðileggja viðurskiftini millum føroyingar og danir.

Hóttan og ræðumyndir byggja einki land.

Mannagongdin skal broytast munandi, og so røkka vit lætt tí máli, sum Føroya fólk ynskir, men hetta skal eg venda aftur til í eini komandi blaðgrein.

*Tórshavn tann 30.08.2000*
**Trygvi F. Guttesen**

# Gloym ikki grundlógina, ið er yvir øllum øðrum (grund)lógum!

Í sjónvarpinum hóskvøldið segði formaður grundlógarnevndarinnar frá arbeiðinum í nevndini, m.a. frá viðmerkingum, ið komnar vóru um komandi grundlóg. Hann nevndi m.a. viðmerkingar umsambandið millum kirkju og stat og um rættindi *»hjá teimum, ið eru samkynd«*.

**Ongin er samkyndur – ikki ein einasti ein, góðin Jóan Pauli!**
Sambært teirri Grundlóg, ið er yvir øllum øðrum lógum, eisini grundlógum landa, er eingin samkyndur! Bíblian – høvuðsgrundlóg okra – er púra greið á hesum øki. Tað,



ið nøkur kalla at vera samkynd, er, sambært Bíbliuni ein tilvitað avgerð nøkur taka **at lata seg brúka móti náttúruni**. Sambært hesari yvirgrundlóg menniskjans er slík avgerð synd móti Skaparanum, ein synd á jøvnum føti við aðrar syndir, ein synd, ið hevur við sær øgiligar fylgir, bæði her á jørð og síðani.

**Frælsið Kristusar**
Gott er at vita, at Skaparin gjørdi útgongd frá syndini og fylgjum hennara, tá Hann sendi einasta Sonin, Jesus Kristus, at doyggja á krossi fyri okkum. Tí upplivа mong, sum vóru lokka til samkynda lívsførslu, at Jesus fyrigevur og reinsar syndir teirra, og setur tey fræls at liva tað lív tey vóru ætlað til, saman við Honum.

**Vit mega vera ansin í grundlógararbeiðinum**
Skal grundlógararbeiðið eydnast, mega vit greitt hava nøkur grundleggjandi viðurskifti fyri eyga. Av øllum hesum er játtanin av Orði Guðs sum høvuðsgrundlógin undir samfelagi okkara hin fremsta. Eru hesi viðurskifti ikki púra greið, arbeiða vit til fánýtis og eiga at steðga.

**Jenis av Rana,**
**Limur Miðfloksins**
**í grundlógarnevndini**



# Postverkið aftur á dagsskránna



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í Vinnumálum, vil hava eina endaliga loysn á Postverksmálinum. Í vikuni fer hann á fund við leiðsluna fyri Postverkið*

John Johannessen

Nýggi landsstýrismaðurin í Vinnumálum, Bjarni Djurholm, ætlar sær í næstum at finna eina endaliga loysn á, hvussu Postverk Føroya skal skipast og rekast.

Landsstýrismaðurin ætlar sær í vikuni á fund við Postverkið, soleiðis at hann nágreiniliga veit, hvørjar tankar leiðslan fyri Postverkið hevur um stovnin.

Tað er tó heilt greitt, at Bjarni Djurholm ætlar at umskipa stovnin. Hann sær tveir møguleikar fyri hesum. Onnur loysnin er at skipa Postverkið eins og Post Danmark, soleiðis at Postverkið verður ein sjálvstøðug almenn fyritøka. Hin loysnin er at gera Postverkið til alment partafelag.

Seinnu loysnini var Tjóðveldisflokkurin ímóti, tá fyrrverandi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm skeyt hana upp.

Bjarni Djurholm er greiður yvir, at Tjóðveldisflokkurin er ímóti at skipa Postverkið sum alment partafelag, men hann ætlar sær kortini at fáa ta loysnina ígjøgnum, sum hann metir vera best hóskandi.

Ætlarnirnar hjá Finnboga Arge um at samansjóða partar av uppgávunum hjá Strandferðsluni og Postverkinum fyri at sleppa undan dupultfunktiónum halda fram.

# Slept málinum um hvalastuldur

*Løgreglan hevur slept øllum vónum um at seta fram skuldsetingar móti teimum, sum stjólu hvalir í grindini í Hvannasundi herfyri*

John Johannessen

Løgreglan veit, hvussu menn hava borið seg at, tá 40 hval hvurvu í grindini í Hvannasundi herfyri. Men løgreglan veit ikki, hvør stjól hvalirnar, og tað væntar hon sær heldur ikki at finna út av.

Tí hevur løgreglan slept málinum um hvalastuldurin.

Tað er nevniliga so, at tey vitnini, sum hava sæð bátar fara avstað við grind, ikki vilja siga løgregluni, hvørjir bátarnir vóru.

At stjala grind er brot á revsilógina, eins og allur annar stuldur, og tí metir virkandi sýslumaðurin í Klaksvík, Karl Johansen, grindastuldurin sum eitt álvarsamt mál.

**Stórt virði**
Talan er um rættuliga stórt peningaligt virði, sum varð stolið í grindini í Hvannasundi. Verður kiloprísurin á grindini settur at vera 30 krónur, er talan um eina upphædd á góðar sekshundratúsund krónur.

Ein vanligur hvalur verður roknaður at vera eini sjey skinn. Hvørt skinnið telur 75 kilo og talan er um 40 hval, sum eru stolnir. Verður hetta faldað, gevur tað eina upphædd á 630.000 krónur.

Sostatt kann av røttum sigast, at talan er um sera álvarsaman stuldur. Men kortini hevur sýslumaðurin í Norðoyggjum gjørt av at sleppa málinum á hesum sinni.

Næstu ferð grind verður í Norðoyggjum, ætlar løgreglan kortini at vera sera varin og halda eyga við grindini alla tíðina, soleiðis at slíkt ikki hendir aftur.

# Rúsdrekkakoyring og harðskapur

*Ein bilførari, sum varð meldaður fyri at koyra ávirkaður, legði á annan mannin, sum hevði meldað. Hesin fekk skaða í annað eygað*

Ein ávirkaður bilførari og eitt av ferðafólkum hansara fóru til henders í Klaksvík leygarkvøldið. Tveir mans høvdu steðgað einum bili, tí teir høvdu brúk fyri einum lyfti, men tá teir høvdu koyrt eina løtu vóru teir varugir við, at bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Hetta vildu teir ikki lata sær lynda. Teir fingu bilføraran at steðga og tá gjørdu teir ikki mætari enn at melda mannin.

Men tað fall ikki í góða jørð. Lítla løtu eftir at bilførarin hevði steðgað bilinum leyp hann í krovið á øðrum ferðafólkinum og ripaði honum nevan frammaná.

»Væl« var rakt, tí maðurin fekk álvarsligan løst í eygað, sigur løgreglan í Klaksvík. Hvussu álvarsligur løsturin er, vita teir ikki heilt, men so mikið álvarsligt var tað kortini, at hann varð sendur til eygnalæknan í Havn til viðgerar, alt fyri eitt.

Tá løgreglan kom á staðið var friður komin yvir mannin aftur, sum nú varð handtikin av løgregluni.

Sýslumaðurin í Klaksvík sigur við Sosialin, at bilførarin verður ákærdur fyri harðskap og fyri at koyra ávirkaður.

